# On The Run - Rosie Around The World



61 ára gamla Rosie Swale-Pope á kampingplássinum har úti við Strond í Havn, sum hon mótvegis øðrum landsmonnum er sera fegin um

Mynd: Birgir Kruse

Útvið fimm ár hevur walisiska Rosie Swale-Pope, 61 ár, ferðast um allan heim. Úr Íslandi er hon komin til Føroya, ávegis til Skotlands og walisiska heimlandið. Ferðin skal gevast út í bók, sum verður hin fimta frá hennara hond. Í dagbókini henda sama dag eg hitti hana, avdúkar Rosie, at heitið verður On the Run.

- Nei, hetta er ikki ein súkkla, sigur Rosie, tá eg spyrja hana, um tað er hon við súkkluni á kampingplássinum, har yviri við Strond, skrivar Birgir Kruse á heimasíðu síni.

Rosie hevur inrættað seg snøgt og funktionelt í vogninum, sum hon dregur aftan á sær. Undirlagið er eitt grønlendskt reinsdjóraskinn og millum viðføri er íslendskt lýsi. Men fyrst og fremst er tað olivenolja eg brúki til alla matgerð, sigur hon. Og so havi eg eina fartelefon hjá Runners Magazine, sum eg skrivi fyri. Tað er altíð ein útreiðsla, at ringja heim frá ymsu londunum. Tú mást venda hvørjum oyra, skalt tú ikki vera ein skuldareyv, tá tú ert komin heim. So nú skal eg líka finna út av føroyska sim-kortinum.

Kvik og prátingarsom er hon, og eftir stuttari løtu er Rosie aftur á veg heim í býin at geva boð frá sær til sonin James, ið røkir heimasíðuna /www.rosiearoundtheworld.co.uk



















